# akra...



Falskar eygnavippur eru eisini væl loyvdar, um tú hevur hug at gera okkurt serligt burturúr, tá tú skalt út. Twiggy, sum hon sá út í 60'unum, tá hon gjørdist »Face of the year«, er stóra fyrimyndin.

## Eyelinari:

Vátur eyelinari er eitt mást í vetur. Vit síggja hann allastaðni, bæði hjá Christian Dior og hjá Gucci. Alt frá eini smalari strípu heilt niðri við vippurnar, og líka til tjúkku 60-ara strikurnar, sum vit minnast frá Twiggy. Heldur tú, at ein svartur eyelinari kann virka ov harður, kanst tú nýta brúnan, gráan ella grønan í staðin

## Highlightari:

Í fleiri ár hevur highlightarin verið nýttur beint undir eygnabrúnum, og við nógvum perlumori í, so at hann glansaði og skein. Nú verður hann fyri tað mesta nýttur inni í eygnakrókunum og nakað undir eyganum. Eitt sindur skal eisini duppast á kjálkabeinini. Highlitarin undir brúnum skal nú ikki vera eins sjónligur, men bert ein ljósur – gjarna mattur – eygnaskuggi.



*»Hóast okkum framvegis dámar væl tann dramatikkin, sum einar reyðar varrar ella eini eygu við tjúkkum eyelinara kunnu geva andlitinum, so eru einar myrkar, breiðar og væl hildnar brýr tó tað, sum gevur allar vakrasta úrslitið«*

Fashionmagzine

## Eygnabrýr:



Eins og ein vøkur mynd skal rammast inn, skal eisini andlitið hava eina vakra rammu...
Tí kanst tú nú trygt lata vera við at nippa eygnabrýrnar so javnan. Tunnu geisha-brýrnar eru væl og virðiliga farnar í søguna, og í eina tíð hava brýrnar nú verið sjónligar. Men seinastu mótasýningarnar hjá stóru mótahúsunum kring heimin vístu greitt, at brýrnar komandi tíðina ikki bert skulu prýða andlitið – tær skulu veruliga markera tað.

## Eygnaskuggar:



Annars verða smokey eyes, sum hava verið nógv frammi í seinastuni, ikki so nógv at síggja í vetur. Tá fokus er á varrarnar, skulu eyguni vera tað minni smurd, og tí fara vit ikki at síggja so nógv til nógv sminkaðu eyguni. Heldur verða tað mattir og neutralir litir av eygnaskuggum og omanfyrinevndi eyelinarin, ið vera hittið í vetur. Smyrt tú tær smokey eyes – minst so til at hava varrarnar bleikar.

## Negl:



Neglirnar verða svartar, gráar og bláar. Grátt og blátt eru litir, ið vit ikki hava sæð fyrr innan neglalakk. Fyrr var alneyðugt, at varrar og negl hóskaðu í liti, men nú er hetta broytt. Man sær t.d. Bláar negl og pink varrar.